gult2 cyan2 magenta2 svart2





*Bjørn á Heygum (næst frá vinstru) er útnevndur svenskur generalkonsul. Her avmyndaður saman við svenska sendiharranum í Keypmannahavn, Carl-Magnus Hyltenius, og konum teirra  Mynd: Jan Müller*

## Bjørn á Heygum nýggjur svenskur konsul

**Hósdagin seinnapartin var Bjørn á Heygum, sakførari úr Havn, settur sum svenskur generalkonsul í Føroyum á samkomu á Hotel Hafnia**

KONSLASKIFTI
*Stefan í Skorini*

Bjørn á Heygum tekur við sum generalkonsul í Føroyum eftir Eyðun á Rógvu Olsen, sum hevur røkt starvið higartil. Í sambandi við útnevningina av Bjørni á Heygum til generalkonsul vitjaði svenski sendiharrin í Keypmannahavn í Føroyum. Sendiharrin, Carl-Magnus Hyltenius, var við til hátíðarhaldið á Hafnia.

Bjørn á Heygum sigur, at hansara høvuðsuppgáva verður at taka sær av svenskum áhugamálum í Føroyum.

– Eg skal í prinsippinum røkja áhugamál Svøríkis í Føroyum. Harumframt skal eg fáa samband í lag av ymiskum slagi millum sviar og føroyingar, og eg skal eisini hjálpa svenskum ríkisborgarum í Føroyum, ið hava tørv á hjálp, sigur Bjørn á Heygum.

Bjørn sigur seg eisini fara at virka sum eitt millumlið millum svensku sendistovuna í Keypmannahavn og fólk, sum sendistovan hevur samband við ella ynskir sambandi við í Føroyum.

### Spennandi uppgáva

Bjørn á Heygum hevur ikki roynt eina slíka uppgávu fyrr, og hann heldur tað vera spennandi at fáa hana litna upp í hendur.

– Tað verður óivað læruríkt at hava hesa uppgávuna sum svenskur generalkonsul, har eg komi at kenna nýggj fólk allatíðina og fái nýggj sambond við fólk. Harumframt verður tað við til at víðka persónliga sjónarringin, sigur Bjørn á Heygum.

Nýggi konsulin ásannar, at hann ikki hevur eins nógv um at vera sum aðrir konslar í Føroyum, t.d. tann norski og íslendski. Hinvegin vísir hann á, at tær grundleggjandi uppgávurnar eru tær somu.

# Dannebrog í húnarhátt í Tinganesi

**Neyðugt var at fella flaggstongina hjá landsstýrinum fyri at fáa niður Dannebrog, sum onkur hevði vundið so fast á stong í Tinganesi sunnumorgunin**

FLAGGSTRÍÐ
*Eirikur Lindenskov*

Tað voldi helst landsstýrismonnum og viðhaldsfólki teirra høvuðbrýggj, at merki dana, Dannebrog, veiftraði í flaggstong landsstýrisins í góðveðrinum sunnumorgunin. Men hetta gav eisini løgreglumonnunum trupulleikar, sum skuldu vera so beinasamir at fáa danska merkið niður úr flaggstongini, áðrenn havnarfólk komu á fótur sunnumorgunin, tí tann ella tey, ið vundið høvdu flaggið upp, høvdu gjørt sær ómak til tess at flaggið skuldi verða hangandi.

Og tað var tað eisini - líka til fólk fór í kirkju…

Boð vórðu tá send eftir húsavørðinum í Tinganesi, sum mátti taka flaggstongina niður til tess at loysa danska flaggið, sum á hvíta krossin hevði fingið áskriftina: Samband!

So er spurningurin, um tað eru svartir sambandsmenn sum vilja siga sína hugsan - ella tað eru skuffaðir fullveldismenn, ið hava mist álitið á landsins stýri, men tað meldaði so søgan einki um.

Ein maður, sum Sosialurin hitti á Tinganesi henda góðveðursmorgun segði, at tá Pauli Ellefsen varð valdur til løgmann fyri 20 árum síðani 5. januar 1981 brotnaði flaggstongin - og vóru tað tey, ið hildu hetta vera eitthvørt tekin. Men hvat tekin hetta kundi vera, visti hann ikki at siga.



*Tað sum ongantíð hent er áður, hendi sunnumorgunin: Føroya Landsstýri flaggaði við donskum flaggi…*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

## Tveir førarar missa kortið

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Løgreglan í Runavík hevur um vikuskiftið tikið tveir førarar, sum hava brotið ferðslulógina somikið grovt, at teir missa koyrikortið.

Fríggjanáttina um tvey tíðina varð ein bilførari tikin fyri at koyra við kenning. Sunnunáttina varð annar førari tikin í Runavík. Løgreglan máldi ferðina á bilinum við nýggja lasaratólinum, og hon var 83 km/t. Førarin fær treytaða frádøming av koyrikortinum, og tað merkir, at hann bæði skal til teori- og koyriroynd, verður upplýst av løgreglustøðini í Runavík.

Í Klaksvík verður sagt frá einum friðarligum vikuskifti. Herverk varð framt á ein handil, har ótangar høvdu grýtt steinar í rútarnar, og trý fólk svóvu rúsin av sær á støðini.

## Tvey ferðsluóhapp við rúsaðum førarum

**Løgreglan í Havn fekk sunnudagin fráboðan um tvey ferðsluóhapp, og í báðum førum var bilførarin ávirkaður av rúsdrekka**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Heilar tvær ferðir sunnudagin var løgreglan í Havn á ferð eftir bilførarum, ið høvdu sett seg við róðrið, hóast teir vóru ávirkaðir av rúsdrekka.

Fyrru ferð var um fimm tíðina sunnudagin, tá ein ávirkaður førari stoytti saman við ein parkeraðan bil á Hoyvíksvegnum. Í tí koyrandi bilinum sótu trý smábørn á baksetrinum, men tey vóru tíbetur í trygdarbelti, so tey fingu einki stórvegis mein.

Seinnu ferð var tað ein bilførari, ið eisini stoytti saman við ein parkeraðan bil á Bursatanga á Kongabrúnni klokkan ellivu sunnukvøldið. Hesin førarin royndi at flýggja frá óhappinum, men tað eydnaðist honum ikki, tí løgreglan fekk hendur á honum beinanvegin. Hon kundi staðfesta, at bilførarin var ávirkaður av rúsdrekka.

Báðir førararnir kunnu vænta sær at missa koyrikortið.

### Eldsbruni á Argjum

Leygardagin eftir middag var fráboðan um ein eldsbruna á Argjum. Tað var eitt skammlop í eini turkitrumlu, ið var orsøkin til eldin. Tíbetur varnaðust fólk eldin skjótt og boðsendu sløkkiliðnum. Eldurin varð sløktur, áðrenn hann gjørdi álvarsaman skaða.

Umframt hesi bæði ferðsluóhappini og eldsbrunan hevur løgreglan í Havn havt heili sjey persónar á støðini at sova rúsin av sær frá fríggjadegnum til mánamorgun. Hetta talið er sera høgt og meira enn vanligt, verður sagt av løgreglustøðini.

gult3 cyan3 magenta3 svart3




